## Ivi um veðurlagsbroytingar

Ein mánað undan ST-veðurlagsráðstevnuni í Keypmannahavn í desember vísti ein meiningakanning í Danmark, at 93 prosent av fólkinum vóru sannførd um, at metingarnar um veðurlagsbroytingarnar vóru rættar, og at 83 prosent vóru líka sannførd um, at menniskjan hevur skyldina. Nú vísir ein nýggj kanning, at nógvir danir hava skift støðu teir seinastu mánaðirnar. Í einari kanning, sum Politiken endurgevur, siga 67 prosent, at veðurlagsbroytingarnar eru veruligar, og 55 prosent geva mannaættini skyldina.



## Fegnast um leitiøki

Í Noregi er oljuídnaðurin ovurfegin um, at stjórnin hevur gjørt av at bjóða fleiri nýggj øki í Barentshavinum og Noregshavinum út til olju- og gassleiting. Í Barentshavinum er talan um 20 øki eystan fyri Goliat-økið, og í Noregshavinum er talan um 43 økir. Norsku umhvørvisverndarfelagskapirnir eru sera misnøgdir við avgerðina hjá stjórnini at víðka leitiøkið. Norges Naturvernforbund vísir á, at avgerðin loyvir oljuvirksemi á leiðum, sum hava stóran týdning fyri fiskivinnuna, og um umhvørvismyndugleikarnir hjá stjórnini hava fyrr mælt frá oljuvirksemi á hesum leiðunum.

# Størri krøv til portørar og bilar




**1. mars kemur í gildi ein kunngerð, sum sigur, at allir sjúkrabilarnir í landinum skulu lúka somu krøv. Tað skal vera sama tænasta allastaðni í landinum, er grundsjónarmiðið**

SJÚKRABILATÆNASTA
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Sjúkrabilatænastan hevur higartil ikki verið nóg væl skipað, bilarnir hava ikki verið líka væl útgjørdir allir, og eingi ítøkilig krøv hava verið til portørarnar, sum hava koyrt við bilinum.

Men 1. mars kemur í gildi ein kunngerð, sum hækkar støðiið nógv.

Kunngerðin sigur millum annað, hvørji krøvini verða til allar bilarnar. Bilarnir skulu vera innrættaðir til at geva sjúklingum bráðfeingishjálp, til føðandi kvinnur og skadd fólk. Haraftrat skulu allir bilarnir verða innrættaðir til at koyra fólk heim í.

Ein bilur skal altíð vera tøkur, og sjúkraflutningstænastan skal vera tilbúgvin alt samdøgrið.

Ein liðlækni, sum skal vera narkosulæknin fer at hava ábyrgdina og umsjónina av tænastuni, og hann skal tryggja, at sjúkraflutningsstarvsfólkini allastaðni í landinum hava neyðugan førleika.

Minst tveir persónur skulu manna sjúkrabilin, tá ið hann fer út. Annars skal vera viðgeri og skal ava gjøgnumført viðgera-útbúgving ella líknandi útbúgving. Hetta kravið er soleiðis orðað, tí langt frá allir portørar í landinum hava enn fingið viðgera-útbúgving. Nú skal ferð setast á at gera portørunum neyðugu útbúgvingina.

Málið við kunngerðini er, at allir portørar skulu fáa neyðugu førleikarnar, og at allir bilarnir eru í góðum standi og hava alla hóskandi útgerð.

# Kunnu liva við semjuni

**Selma Ellingsgaard heldur, at hóast tey ikki fingu alt við í semjuna við Fíggjarmálaráðið um portørarnar, so er hetta kortini ein semja, tey kunnu liva við**

SEMJA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Selma Ellingsgaard fegnast um semjuna*

Tá talan gerst um eina semju, so mugu báðir partar boyggja seg nakað. Og tað mátti Starvsmannafelagið eisini gera.

- Vit vóru noydd at slaka í eftirlønini, sum framvegis stendur á 10 prosentum. Hana vildu vit annars hava upp, sigur Selma Ellingsgaard, forkvinna í Starvsmannafelagnum.

Hon viðgongur, at talan hevur verið um ein tungan burð at fáa nýggjan sáttmála fyri portørarnar undir land, men tað er so eydnast nú.

- Tilgongdin hevur verið tung. Vit hava verið noydd út í eitt verkfall, og vit hava verið serstakliga ónøgd við avgerðirnar hjá Fasta Gerðarrættinum, sum vit meta er farin út um sínar heimildir, sigur Selma Ellingsgaard.

Hon fegnast tó um, at tað hevur eydnast at fáa heili 9% hækkan á grundlønina, men vísir samstundis á, at talan er um eitt tíðarskeið, ið næstan er runnið.

- Talan er um ein tríára sáttmála, sum gongur út í oktober 2010, so talan er í veruleikanum um eitt næstan runnið tíðarskeið, sigur forkvinnan í Starvsmannafelagnum.

### Liggur eftir

Eisini onnur viðurskifti enn eftirlønin fingust ikki upp á pláss í hesum umfarinum.

- Vit ynkstu at bólka vanligu starvsfólkini upp í tríggjar flokkar, men endaðu á tveimum í staðin, og tað er so nakað, vit mugu taka upp aftur til komandi samráðingar, sigur Selma Ellingsgaard.

Hon sigur, at í tí førinum vunnu tey kortini prinsippmálið um, at øll ikki skuldu bólkast saman, men at hugt var eftir førleika og ábyrgd.

- Tað liggja avbjóðingar fyri framman enn, men semjuna kunnu vit liva við, sigur Selma Ellingsgaard.

Grundlønin hækkaði heili 9%, men tað var neyðugt, at hon hækkaði so nógv, metir forkvinnan.

Men um stóri lønarvøksturin fer at hava nakra ávirkan á tær samráðingar, sum verða aftur í heyst, dugir Selma Ellingsgaard ikki at siga.

- Hettar er seinasti sáttmálin við Fíggjarmálaráðið, sum liggur eftir fyri farna tíðarkeiðið, men hvussu og um hetta fer at hava ávirkan á samráðingarnar í heyst ber illa til at siga. Greitt er kortini, at nýggjar samráðingar byggja á undanfarnar sáttmálar, sigu Selma Ellingsgaard sum fegnast um, at tað hevur eydnast at fingið eina semju í samráðingunum um portørarnar.